# Kappast um ferðafólkini

**Tað koma fleiri stór, útlendsk ferðamannaskip á Havnina um árið. Men tað letur til, at tey antin fara útferð ella ein innkeypstúr. Ikki bæði. Og tað má sigast at vera harmiligt, tí tað átti at verðið rúm fyri báðum, heldur millum onnur handilskona í Havn**

FERÐAVINNA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Føroyingar kundu ment ferðavinnuna nógv meira og fingið meira burtur úr henni fíggjarliga, um bert nøkur viðurskifti vórðu betrað*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Mangan hevur verið ført fram, at føroyingar hava ein klassiskan trupulleika, tá tað kemur til ferðamannaskip, sum kom í havn sunnudagar. Hetta tí at upp og afturlatingartíðirnar gera, at tað ikki er loyvt at hava opið sunnumorgnar. Men spurningurin um undantøk tykist at verða oftari og oftari uppi at venda um summarið, tá ferðafólkatalið er upp á tað hægsta. Og ein annar spurningur er eisini, um tað veruliga er upp og afturlatingartíðirnar, sum eru trupulleikin og ikki samstarv innanhýsis í Føroyum millum tey, sum hava við ferðafólkini at gera.

Seinasta sunnumorgun kom tað størsta ferðamannaskipið í ár á Havnina. Luksusferðamannaskipið Crystal Symfony. Umborð vóru amerikonsk ferðafólk, sum løgdu nakað av peningi eftir sær í Føroyum. Men so er ikki altíð, tí ofta er so lítið av tíð, at tað heldur verður eitt stríð millum tey, sum fáast við útferðir og tey, sum hava handlar, um ferðafólkini.

## Selja nógv

Hendan sunnumorgunin hevði tað tó eydnast Kunningarstovuni í Havn at bera so í bandi, at nakrir handlar høvdu opið. Ein av handlunum, sum hevði opið, var Skipshandilin. Og tey lata væl at søluni hendan dagin.

– Her var nógv fólk inni á gólvinum, og vit seldu nógv, verður sagt frá Skipshandlinum.

Ester Magnusson í Skipshandlinum hevur hug at fílast eitt sindur inn á tilrættisleggingina av tílíkum stuttum steðgum hjá ferðafólki við ferðamannaskipunum. Hon vísir á, at meðan vit tosa, liggur eitt stórt ferðamannaskip beint uttan fyri molan, men hon hevur ikki sæð eitt menniskja frá tí inni í handlinum. Hetta sigur hon kemur av, at tað ikki er tíð til tað.

– Hetta er bert til bussferðir, og tíðin er so knøpp, at tað ikki eru stundir til, at bussurin steðgar eina løtu uttan fyri handlarnar í Havn og harvið geva ferðafólkunum ein møguleika til at keypa. Og tað er stórt spell, sigur hon. Hon heldur, at tað átti at verðið betur tilrættislagt hjá hesum ferðafólkunum, soleiðis at tey kundu fáa tíð til at keypa eisini, meðan tey eru í landi.

Skipshandilin hevur enntá roynt at havt sølubúð á molanum ella á Bursatanga, men sjálvt ikki har hava ferðafólkini havt so frætt av tíð, áðrenn tey skula í bussin, at tey hava kunnað keypt nakað serligt. Og tað harmast Ester um. Hon sigur, at tað er skjótt at selja eitt sindur, so um shopping varð raðfest eitt sindur hægri hjá teimum, sum tilrættisleggja útferðartúrarnar, so høvdu fleiri handlar í Havn fingið eitt gott íkast av hesum.

Hon heldur, at ein útferðarbussur átti at steðgað nakrar ferðir, meðan hann koyrir ígjøgnum Havnina og harvið givið ferðafólkunum høvi til at fara at keypa.




*Tað letur til at vera ein kampur millum bussferðir og handlar um tey ferðafólkini, sum koma til landið við ferðamannaskipum. Tí sjáldan eru tað stundir til bæði útferð og keyp*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## 30 skip um árið

Jóhan Mortensen, sum hevur ta uppgávuna at skipa fyri, at tílík skip koma til kei, vísir á, at tað koma 30 skip til Havnar í ár, og at talið verður tað sama komandi ár. Hann heldur, at vit kundu gjørt nógv meira við at fingið meira burturúr hesum ferðafólkunum og harvið marknaðarført Føroyar betur og meira sum eitt ferðamannaland.

Hann hevur fleiri hugskot um, hvat kundi havt verðið gjørt. Millum annað vísir hann á, at Føroyar eru jú ein fiskivinnutjóð, men tað sást ikki væl aftur á mat skráunum hjá teimum ymsu matstovunum.

– Ferðavinnan haltar eitt sindur her, serliga tá tað kemur til hendan partin av ferðavinnuni. Til dømis sunnudagin høvdu við ein upplagdan møguleika til at vinna pening burtur úr ferðafólkum, sum vilja brúka pening, sigur hann og leggur samstundis dent á, hvussu týdningarmikið tað er, tí tað eru ikki øll ferðafólk, sum leggja pening eftir sær í Føroyum. Tí ræður um at vera úti um seg, tá tað kemur til tey meiri múgvandi ferðafólkini.

## Aðrar møguleikar

Sostatt kann staðfestast út frá hesum, at tað ikki altíð liggur so væl fyri hjá føroyingum at vinna pening burtur úr ferðafólkum. Men tað má sigast at vera spell – serliga tá talan er um tilrættislegging, sum kundi verðið gjørd betur.

Jóhan Mortensen heldur, at Føroyar kundu gjørt tað so nógv betur, tá tað kemur til ferðavinnuna á so mongum økjum. Eitt er tann vakra og stórsligna náttúran, men so eru so sanniliga eisini aðrir møguleikar, heldur hann. Til dømis at bjóða ferðafólkunum meira fisk og aðrar føroyskt framleiddar vørur. Á tann hátt marknaðarføra føroyingar eisini betur okkara egnu vøru. Og so aðrar tænastu eisini.

Jóhan rósar hinvegin millum annað tænastum sum til dømis tannlækna ella lækna.

Hann sigur, at tá tílík ferðamannaskip koma inn, vísir tað seg ofta at vera eitthvørt, sum bagir onkrum, og ein má undir læknahond. Og tann skipanin er stak professionell, sambært Jóhan Mortensen.

Hann greiðir at enda frá einum tilburði í sambandi við eitt annað ferðamannaskip, har skipanin við bráðfeingishjálp virkaði til fulnar.

Eitt ferðamannaskip lá uttanfyri molan. Og so hendi tann vanlukkan, at ein maður fekk hjartaslag umborð. Jóhan greiðir frá, at tað bert gingu 14 minuttir frá tí, at Landssjúkrahúsið fekk boðini, til maðurin kom undir skurð. Lívið hjá honum varð bjargað.

– Allar tænastur av slíkum slagi eiga rós uppiborið. Og eisini tá tað kemur til at fáa eitt skip til kei. Tað virkar alt, sum tað skal, so vit kunnu ikki siga annað enn, at Føroyar hava nógvar veldugar møguleikar til at menna seg sum ferðamannaland. Vit eru komin nógv longri, men enn halta vit fleiristaðnis, sigur Jóhan Mortensen at enda.



# Eldrafelagið Nón vitjan úr Danmark

**29 pensjónistar úr Danmark, kvinnur og menn, búgva hjá privatfólki við Skálafjørðin og í Elduvík í hesum døgum. - Øll eru ovurfegin og púrasta ovfarin av blíðskapinum, sigur Amy Djurhuus, formaður í Eldrafelagnum Nón**

VITJAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Danskir pensjónistar saman við vertunum úr Eysturoynni uttanfyri Nes kirkju. Ernst Hansen greiddi frá um gomlu kirkjuna, sum er bygd í 1843.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tíðliga mánamorgunin komu 29 pensjónistar úr Svendborg og Tåsinge við Norrønu til Føroya at vitja pensjónistafelagið Nón á Skálafjørðinum.

## Búgva privat

Amy Djurhuus, sum er formaður í Nón, sigur, at tey kendu ikki hesi fólkini, áðrenn tey komu higar.

- Ein føroysk kona hiðani av leiðini, sum býr í Svendborg, hevur fingið ferðina í lag. Hon helt, at tað hevði verið áhugavert hjá hesum fólkum, sum regluliga møtast í einum tilhaldi, at vitja í Føroyum.

Øll tey 29 fólkini, harav 10 eru pør, búgva privat í Runavíkar-økinum, á Toftum og í Elduvík.

Sosialurin var við úti á Nesi seinnapartin mánadagin, tá ið ferðalagið saman føroysku vertunum vitjaði í Nes kirkju, og har Ernst Hansen var so beinasamur at siga teimum søguna um kirkjuna, sum er bygd í 1843.

## Bussur og førari

Á ferðini í Føroyum hava donsku pensjónistarnir ein buss við sær og førara.

Gjáramorgunin, tá ið vit tosaðu við Amy, bar leiðin norður til Klaksvíkar og Viðareiðis, haðani ætlanin var at fara so skjótt, komið varð um Leirvíksfjørð.

Í Leirvík vóru tey inni á bátasavninum.

- Tá ið vit koma aftur til Klaksvíkar í dag, fara vit at vitja í Leikalund, gamla handlinum hjá Jens Klæminti og í Christianskirkjuni, har serstøk altartalva hongur, sigur Amy.

## Hugtikin og ovfarin

Formaðurin í Nón leggur dent á, at donsku pensjónistarnir bæði eru hugtiknir av landinum, ovurfegnir um ferðina og púrasta ovfarnir av blíðskapinum, teimum er vístur.

- Fólk eru ógvuliga glað; lagið er gott, og stemningurin er lættur, sigur Amy Djurhuus.

Donsku pensjónistarnir fara avstað aftur við Norrønu fríggjadagin komandi.



*- Fólk eru ógvuliga glað; lagið er gott, og stemningurin er lættur, sigur Amy Djurhuus, formaður í Eldrafelagnum Nón.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Farið er um líradag og havhestatíð er

**Hetta er ein spennandi tíð hjá teimum, sum gera nakað við fuglaveiði**

FUGLAVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Í Skúvoy er lutfalsliga nógvur líri. Neyðugt er at ganga væl um fuglin, tí hann er so viðbrekin, um hann ikki verður veiddur á skynsaman hátt.*

Í gjár, 26. august, var líradagur. Hetta er dagurin, tá ið menn plagdu at draga líra á plássum, har skrápur, sum er gamli fuglurin, byggir reiður. Skrápur reiðrast djúpt niðri í urðagróti og holum, sum hann grevur niður bakkan og moldina.

Ymsastaðni kring landið verður líri tikin, men henda veiða er ikki so vanlig sum havhestaveiða.

Nógv minni er til av skrápi sum búfugli í Føroyum enn av havhesti, sum reiðrast í berginum um alt landið.

Líri verður vanliga drigin upp úr holuni við króki, sum er festur á ein stívan og boyggiligan jarntráð. Verður fuglurin tikin á nátt, sum er meira vanligt, verður gingið við lummalykt eftir urðagrótinum og á grønum blettum, sum eru millum urðagrótið.

Mong hava ongantíð sæð ein livandi líra, tí hesin kemur bert út úr holuni, tá ið kvøldarmyrkrið kemur. Tá ið myrkt er, kemur hann út úr holuni at læra seg at flúgva. Hann kemur eisini út at taka ímóti skrápinum, sum kemur innaftur av havinum við føði. Tá ið skrápurin er komin aftur at landi um midnáttarleitið, fara gamli fuglurin og ungin innaftur í holuna.

Summi kvøld er nógvur líri úti; onnur kvøld minni.

Á teimum plássum, har líri verður veiddur, er hetta ein hugnalig tíð.

Tað, vit vita um, eru skúvoyingar millum teir ídnastu at veiða líra.

## Havhestur

Hetta er eisini tíðin, tá ið havhestaungin flýgur út av rókini, og hópur av bátum og monnum kring landið fáa sær upp í tunnuna til veturin, sum stundar til. Aðrir sláa seg saman og royna at tjena sær nakrar krónur hesa tíðina.

Eitt sindur ymiskt er, nær besta tíðin er. Hetta kann vera tengt at veðrinum, men tað, sum hevur størstan týdning, er, nær gamli fuglurin er lagstur, og hvussu umstøðurnar hjá unganum at búnast nú einaferð hava verið.

Summi ár fæst havhestaungi á sjónum longu 23. august. Onnur ár kanst tú fara ein langan túr, 26. august - og ongan fugl síggja á sjónum.

Mangt bendir á, at havhestaungin er eitt sindur seinur á veg í ár.

Menn, sum vóru og stimaðu 23. august, fingu at kalla ongan havhest. Vit hava hoyrt um tveir bátar, sum gjørdu eina roynd hendan dagin. Annar fekk ein fugl; hin tríggjar.

Vit vita eisini um ein bát, sum var ein túr norðanfyri mánadagin í hesi vikuni; hann fekk 17 havhestaungar.

Eftir øllum sólarmerkjum at døma, er havhestaungi nú á veg á sjógvin. Nær bestu dagarnir verða í ár, er torført at siga. Roknast kann tó við, at dagarnir báðumegin mánaðarskiftið, august/ september, verða teir, sum fara at roynast - alt eftir, hvussu veðrið háttar sær.

Og soleiðis plagar tað at vera - næstan á hvørjum ári.